# Stjørnurnar vístu seg fram til MTV Music Awards

**Mánanáttina vóru árligu MTV Video Music Awards hildnir í USA, og í dagens anledning høvdu tónleikastjørnurnar og onnur latið seg í fínasta og nýggjast pussið. Flestu kvinnurnar vóru í kjóla, meðan fleiri av monnunum vóru í kovboybuksum og troyggjum**

Móti
Planet.fo
Myndir: Scanpix

Tey kendu gera nógv burtur úr, tá ið tey skulu til stóru showini, har virðislønir verða lætnar. Fyri nógv av teimum er talan um ein tann størsta dagin í árinum, og tá verða ikki bæði tey frægastu klæðin tikin fram.

Kvinnurnar fáa serligar kjólar seymaðar til kvøldið, og sniðini eru bæði vøkur og avbjóðandi. Menninir hinvegin plaga at finna sær sítt egna úttrykk við meira vanligum klæðum, og teir smæðast ikki við at fara í kovboybuksir og t-shirt.

Mánanáttina var aftur eitt av teimum stóru showunum á skránni, tá MTV læt virðislønir til bestu og kendastu tónleikararnar í farna ári.

Rockbólkurin Green Day gjørdist stóri vinnarin hetta kvøldið, og teir fingu ikki færri enn sjey virðislønir fyri sín tónleik.

Men tað vóru nógvir aðrir smærri og størri sigrar, og klæðini vóru eisini við til at seta dám á kvøldið.



Teir tríggir í Green Day vóru allir í skjúrtum og slipsi – har vóru ongar kovboybuksir á skránni stóra kvøldið hjá teimum, tá teir vunnu 7 virðislønir.



Sjónleikarin Carmen Electra var farin í ein litríkan apelsinlittan kjóla, og hon smæddist ikki, tá hon skuldi avmyndast



Alicia Keys var í einum meira klassiskum, longum kjóla. Hon vann eina virðisløn hetta kvøldið



Tvær av stóru latínstjørnunum – Ricky Martin úr Puerto Rico og Paulia Rubio úr Mexico. Rubio var í einum vøkrum svørtum kjóla, meðan Ricky Martin var í koyboybuskum og svartari troyggju – sum um hann skuldi eitthvørt ørindi ein gerandisdag




Ein av nýggju stjørnunum í Hollywood, Eve Longoria, sum spælir við í sendirøðini Desperate Housewives, kom til tiltakið saman við Nelly. Hon var farin í ein lættan kjóla, meðan hann var mest sum gerandisklæddur



Tær í Destiny's Child vóru allar farnar í vakrar kjólar. Tær høvdu valt sær ymsikar litir og ymisk snið, men kjólarnir vóru í familju við hvønn annan



Jessica Simpson vísti fegin fram sín nýggja kjóla, sum hon hevði fingið seymað til kvøldið. Ryggurin var mest sum allur berur, og kjólin var stuttur, men Simpson strálaði frammanfyri myndamonnunum